Runavíkar Kommuna

Boks 139 · Heiðavegur 26 · FO-100 Saltangará
tlf 417000 · runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

# Kunngerð
til
løgtingsveljarar í Runavíkar kommunu til løgtingsvalið 19. januar 2008

**BRÆVATKVØÐUR**
Veljarar í Runavíkar kommunu, ið sambært vallóginalúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við 18. januar 2008.
Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðin, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 417000 í seinasta lagi 18. januar 2008 kl. 16.00.

**VALKORT**
Við hesum verður gjørt kunnugt, at til løgtingsvalið verða valkort send øllum veljarum í kommununi.
Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt býráðsskrivstovuni frá í seinasta lagi 18. januar 2008 á tlf. 417000

**VALSTØÐINI** í Runavíkar kommunu til løgtingsvalið 19. januar 2008:

Fyri valstaðið í Runavík í Ítróttarhøllini í Runavík fyri bygdirnar:
Skipanes, Søldarfjørður, Lamba, Lambareiði, Glyvrar, Saltangará, Runavík, Rituvík og Æðuvík.

Fyri valstaðið á Skála fer fram í pensionistahúsinum á Skála fyri bygdina:
Skála

Fyri valstaðið í Skálafirði í skúlanum í Skálafirði fyri bygdina:
Skálafjørður

Fyri valstaðið í Oyndarfirði í skúlanum í Oyndarfirði fyri bygdina:
Oyndarfjørður

Fyri valstaðið í Elduvík í skúlanum í Elduvík fyri bygdina:
Elduvík

Fyri valstaðið Funningsfirði í skúlanum í Funningsfirði fyri bygdina:
Funningsfjørður

Atkvøðugreiðslan byrjar KL. 10.00 fyrrapart og heldur fram til KL.20.00 – ELLA SO LEINGI VELJARAR MØTA UTTAN STEÐG.

**Runavíkar Býráð**

Almanna- og Heilsumálaráðið

# Vit leita eftir løgfrøðingi til Almanna- og heilsumálaráðið

Starvið sum løgfrøðingur í Almanna- og heilsumálaráðnum er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum nærum altíð skulu loysast í tøttum samstarvi við aðrar starvsfelagar í ráðnum. Starvið er sjálvstøðugt, og tú ført góðar møguleikar fyri skeiðum og framhaldandi eftirútbúgving.

Sum løgfrøðingur í Almanna- og heilsumálaráðnum verða tínar uppgávur eitt nú at tilevna lógaruppskot og uppskot til kunngerðir, viðgera kærur frá borgarum, at svara fyrispurningum frá løgtinginum og at tulka lógir og reglur fyri stovnar undir Almanna- og heilsumálaráðnum.

Ert tú cand. jur. ella er um at verða liðug, so vilja vit fegin frætta frá tær.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum og skjølum skulu sendast til:

**Almanna- og heilsumálaráðið**
**Eirargarður 2**
**FO-100 Tórshavn**

og vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. januar 2008 kl. 12.00.

Tú ert vælkomin at venda tær til Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á telefon 304050 ella senda eitt teldubræv til ahr@ahr.fo. Eisini ber til at vitja heimasíðu okkara www.ahr.fo, har eitt nú bygnaðurin og uppgávurnar hjá Almanna- og heilsumálaráðnum eru lýstar. Almanna- og heilsumálaráðið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál.

Almanna- og heilsumálaráðið umsitur almannamál, heilsumál, og bústaðarmál. Tað starvast í løtuni 32 fólk í ráðnum. Uppgávan hjá Almanna- og heilsumálaráðnum er í høvuðsheitinum at ráðgeva landsstýrismanninum, at tilevna lógaruppskot, kunngerðir og aðrar reglur og at veita stovnum undir ráðnum ráð og vegleiðing.

**Vit draga eina línu** **Vit seta skynsemi í hásæti**
**Vit vilja vita** **Vit bróta slóð**

MIÐVÁGS KOMMUNA

# K U N N G E R Ð

**TIL LØGTINGSVELJARAR Í MIÐVÁGS KOMMUNU TIL VALIÐ TANN 19. JANUAR 2008.**

**VALIÐ** fer fram í **BYGDASKÚLANUM** í Miðvági.

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 og heldur fram til kl. 20.00 – ella so leingi veljarar møta uttan støðg.

**Veljarar,** sum sambært vallógini lúka treytirnar fyri at greiða **brævatkvøðu**, kunna atkvøða á kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við fríggjadagin 18. januar 2008.

Tey, sum vegna sjúku ikki kunna koma á valstaðið, kunna velja heima. Hesi skulu boða frá á kommunuskrivstovuni tlf. 332429 sum skjótast og í seinasta lagi fríggjadagin 18. januar 2008 kl. 15.00.

**Valkort** verða send øllum teimum, sum standa á vallistanum. Um onkur, sum heldur seg hava vælrætt, ikki hevur fingið valkort, skal viðkomandi boða frá á kommunuskrivstovuni sum skjótast og í seinasta lagi fríggjadagin 18. januar 2008 kl. 15.00.

**Valstýrið í Miðvági**

MIÐVÁGS KOMMUNA

# K U N N G E R Ð

**Til veljarar í Miðvágs kommunu**

## Vegleiðandi fólkaatkvøða um kommunusamanlegging

**verður tann 19. januar 2008.**

**VALIÐ** fer fram í **BYGDASKÚLANUM** í Miðvági.

**Atkvøðugreiðslan** byrjar kl. 10.00 og heldur fram til kl. 20.00 – ella so leingi veljarar møta uttan støðg.

**Miðvágs bygdaráð**

Sosialurin
www.sosialurin.fo



Míni mál:
**Ferðavinnan**
**Ítróttur**
**Tónleikur**
Oskar Eiriksson
Fart: 510 796
Fólkaflokkurin

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!